

Mjølnir Føroyameistarar 1999/2000 í meistaradeildini fyri kvinnur

# Sosialurin ynskir Mjølnir og Fleyr hjartaliga tillukku við meistaraheitunum

Fleyr Føroyameistarar 1999/2000 í meistaradeildini fyri menn



## Dráttur verður nummar trý

*Flogbóltur: Fríggjakvøldið fingu vágafólk høvið til at meta um møguleikarnar hjá Drátti at vinna steypafinaluna tá vágakvinnur hittu Mjølnir. Men eins og fyrr í ár dróg Mjølnir longra stráið*

SVEINUR TRÓNDARSON

**Dráttur-Mjølnir 0-2**

Leygardagin verða steypafinalurnar hjá bæði kvinnum og monnum, men longu hetta vikuskiftið leiktu liðini í steypafinalunum innanhýsis dystir. Hjá kvinnum var seinasti dysturin á skránni hjá Drátti móti Mjølnir og hann endaði við, at klaksvíkskvinnur vunnu 2-0.

Hóast tað, so var kortini talan um ein rættuliga góðan dyst til tíðir.

Í fyrra hálvleiki var Mjølnir betra liðið og í veruleikanum eydnaðist tað ongantíð Drátti at fáa fatur í skilagóða spælinum hjá meistarunum úr Klaksvík.

Í øðrum setti kom so ferð á Drátt. Tær royndu av øllum alvi at koma inn í spæli og tað eydnaðist teimum at vinna eitt sett móti meistarunum.

Vit skilja, at tað serliga var blokaduspælið hjá Drátti, sum virkaði serliga væl, og tað helt Mjølnir niðri eina tíð. Men royndirnar á Mjølnirliðnum komu teimum til góðar, tá tær í staðin fóru at leggja dent á lopp og aðrar álopshættir.

Hetta eydnaðist og seinasta javnbrótaran vann Mjølnir greitt.

Tískil endaði dysturin við sigri til meistararnar úr Mjølnir.

**Finalan fyri framman**

Hetta var næstseinasti dysturin hjá Mjølnir og Drátti í ár. Nú restar bert steypafinalan, sum á fyrsta sinni í mong harrans ár aftur verður leikt næsta vikuskiftið.

Skulu vit fara at gita um hvat av liðunum fer at vinna, so fara vit at seta nakrar krónur upp á meistararnar úr Klaksvík. Tær hava roynst knáar í ár og tað fer at vera meiri enn torført hjá Drátti at koppa Mjølnir, sum av álvara hevur fingið skil á spæli.

Blandingurin við royndum og yngri leikarum hevur víst seg at vera serstakliga góð í ár og tað tykist ñ uttan at taka nakað frá hinum liðunum ñ at tær eru klassar betri enn hini liðini.

Dráttur hevur roynt í ár og tað skulu tær eiga. Tær hava barst fyri at fingið síni úrslit um enn tað kann fara at tykjast í tyngra lagi næsta leygardag.

## Bárður vann

*Flogbóltur: Venjarin hjá Fortunu hevur valt ikki at brúka Gudrid í seinastu dystunum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Um vikuskiftið hevði mansliðið hjá Fortunu vitjan av Lyngby, sum teir hava tapt tríggjar ferðir ímóti í ár.

Men hesaferð bragdaði. hjá Fortuna Odense.

Seianstu tvær vikurnar hava teir lagt dent á at venja nógv móttøku og verjuspæl og tað gav úrslit í dystinum móti Lyngby, sum annars hevur eitt sera gott og vælvirkandi álop.

Nógvir bóltar vóru fingnir uppaftur tá tað sá mest ómøguligt út og tí vann Fortuna dystin 2-0.

**Gudrid úti**

Hjá Fortunakvinnum er annars eitt sindur øðrvísi. Gudrid, sum hevur verið við í fleiri dystum hjá besta liðnum hjá Fortuna, hevur so at siga fingið durafjórðingin eftir at Fortuna hevur fingið nýggjan venjara.

Hann hevur valt at koyra upp á royndirnar og ikki kann sigast annað enn at hann hevur ríkiligt at taka av í so máta.

Men úrslitini hava verið alt annað enn góð, síðani broytingina. Fortunakvinnurnar hava tapt allar dystirnar í fyrireikingini til endaumfari, og so er spurningurin um Gudrid kundi havt gjørt tað øðrvísi.

TV55 við Anniku og Alvildu spæli móti HIK Aalborg, og tann dystin vunnu dámurnar úr Jútlandi. Úrslitið gjørdist 2-0 til HIK.



# Kasparov og Kramnik javnir

*Í stórari altjóða talvkapping í Spaniu herfyri, gjørdist Gary Kasparaov, saman við landsmanni sínum, Kramnik, vinnari, og Flóvin Þór Næs hevur í seinastuni roynt seg í Ungarn*



Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Um vikuskiftið endaði Super GM kappingin í Linares, Spania, har fimm teir fremstu telvarnir í heiminum og Fide heimsmeistarin Alexander Khalifman, telvaðu tvær ferðir móti hvørjum øðrum. Seks telvarar og tíggju umfør.

Gary Kasparov var sjálvsagt favorittur at vinna kappingina, tá hugsað var um hansara form tað seinasta árið og hansara methøga ratingtal.

Tað sást frá byrjanini, at fremsta pláss fóru Kasparov og landsmaðurin Kramnik at stríðast fyri. Anand fekk sera ringa byrjan og hevði tí ongan kjans at blanda seg í toppin.

Fide heimsmeistarin, Khalifman við sínum "bert" 2656 ratingstigum hevði eina sera góða kapping.

**Endaliga støðan varð:**

| | |
|---|---|
| Kasparov | 6/10 |
| Kramnik | 6 |
| Leko | 4,5 |
| Khalifman | 4,5 |
| Anand | 4,5 |
| Shirov | 4,5 |

Kasparov og Kramnik telvaðu átta javnleikir og vunnu hvør sítt tvey talvið.

Meiningin var at sláa platt og krónu fyri at avgera vinnaran, men Kasparov helt, at talv átti ikki at avgerast við einum krónukasti. Teir báðir søgdu seg vera troyttar, takkaðu nei at telva tvey snartalv fyri at finna vinnara, og avgjørdu síðani í felag at deila fyrsta pláss.

Hinir fýra telvarnir deildu triðja og aftasta pláss! Talvið sum er við í blaðnum í dag, varð valt til besta talv í kappingini. Talvið er millum vinnararnar av kappingini, og er frá áttanda umfari. Javnleikur varð úrslitið, men talvið er heilt klárt vert at hyggja at.



*Vinnararnir av kappingini í Spaniu, sum esisini eru luttakararnir í talvinum hesa vikuna*

**Flóvin í Ungarn**

Flóvin Tór Næs telvar í løtuni í einari tíggjumans IM-kapping í Ungarn. Kappingin kallast First Saturday.

Tað seinasta Flóvin lat frætta frá sær, hevði hann telva seks av teimum níggju talvunum sum telvast skulu, og hevði hann telvað øll javnt!

Flóvin sigur, at sínir seks javnleikir á rað eru persónligt met. Flóvin er nærmast kendur fyri at stríðast til síðsta leik, og ikki plagar hann at leika nógvir javnleikir í somu kapping, tí er hendan javnleiksrøðin sera óvæntað.

Hann liggur á einum deildum fjórða plássi, og hevur tí góðar møguleikar at enda í ovaru helvt.

Flóvin er styrkismettur sum nummar átta av teimum tíggju luttakarunum.

### Talvstubbi

CARL ELI NOLSØE SAMUELSEN

Olaf Berg vann árligu vetrarfelagskappingina í Havn. Hann vann móti nógvum navnfrømum hægri styrkismettum telvarum, eitt nú vann hann á Ólavi Simonsen, undirritaða, Herlufi Hansen og Martini Poulsen.

Hesi úrslit prógva tey øgiligu talent hesin ungi havnarmaðurin hevur.

## Talvið hesa vikuna

*Hvítur : Vladimir Kramnik 2758*

*Svartur: Gary Kasparov 2851*

*Super GM*

*Linares*

1. Rif3 Rif6
2. c4 c5
3. g3 d5
4. d4 dxc4
5. Fa4+ Bd7
6. Fxc4 Bc6
7. dxc5 Bd5
8. Fa4+ Bc6
9. Fc4 Bd5
10. Fc2 e6
11. Bg2 Be4
12. Fc4 Bd5
13. Fh4 Bxc5
14. Ric3 Bc6
15. O-O Be7
16. Rd1 Fa5
17. Bd2 Ribd7
18. g4 h6
19. Fg3 Fa6
20. h4 Fc4
21. Bf4 Fb4
22. a3 Fxb2
23. Rid4 g5
24. Rixc6 gxf4
25. Fd3 bxc6
26. Bxc6 O-O
27. Bxa8 Rie5
28. Fd4 Rxa8
29. Fxe5 Rc8
30. Rac1 Rid5
31. Rixd5 Fxe5
32. Rixe7+ Kg7
33. Rxc8 Fxe2
34. Rg8+ Kf6
35. Rd7 Fe1+
36. Kg2 Fe4+
37. Kh2 Fc2
38. Kg2 Fe4+
39. Kh2 Fc2
40. g5+ hxg5
41. Rxg5 Fxf2+

1/2-1/2

# Stóu seg væl

*Føroysku svimjigenturnar, sum um vikuskiftið royndu seg í norðurlendskari meistarakapping, stóðu seg væl*

JÁKUP MØRK

Heidi Andreasen og Esther Gaard Hansen, luttóku um vikuskiftið í stóru kappingini, Nordic-Cup 2000, sum var hildin í Greve.

Hóast tað ikki gjørdist til nøkur gullmerki á hesum sinni, so stóðu tær báðar seg sera væl, og millum teir 200 luttakararnar, sum vóru við í kappingini.

Esther luttók í seks kappingargreinum, og tað eydnaðist henni at vinna sær tvey silvurmerki og eitt bronsumerki. Harumframt eydnaðist tað henni eisini at svimja seg undir kravtíðina til Paraolympisku leikirnar í 100 metra firvaldasvimjing.

Heidi fekk eingi heiðursmerki hesu ferð, men hon stóð seg kortini sera væl, og varð m.a. nr. 4 í 100 metra ryggsvimjing.

Hjá báðum gentunum var talan um lið í fyrireikingunum til Paraolympisku leikirnar í Sydney, sum verða hildnir komandi heyst.

Enn er tó ikki væntandi, at úrslitini verða á hædd við tey, sum núverandi venjari teirra, Katrin Johansen, fekk í 1988, men tær báðar hava tíðina fyri sær, so møguliga er er talan um tveir komandi føroyskar gullfiskar.



## Seinasta flogbóltskappingin

*Móti endanum av mánaðinum verður punktum sett fyri flogbóltsárinum, 1999/2000*

JÁKUP MØRK

Árliga steypakappingin hjá floggbóltsfelagnum, Dráttur, verður leikt á Giljanesi vikuskiftið 25. og 26. mars.

Kappingin er fyri allar vaksnamannadeildir hjá kvinnum og monnum, og tá allar aðrar kappingar tá eru liðugt leiktar, verður hetta samstundis eitt punktum fyri kappingarárinum 1999/2000.

Nú leikararnir í allan vetur hava stríðst til tess at vinna sær so góð úrslit sum gjørligt, er ivaleyst mangt og hvat at tosa um, og tískil verður eisini skipað fyri dansi í bygdarhúsinum í Miðvági.

Dráttur boðar frá, at tey, sum ynskja at luttaka, eiga at siga frá hesum fríggjadagin 17. mars á tlf. 333009 millm kl. 21.15 og 22.30

